## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Strúkur í vindi upp í skrið av landsynningi, 13-20 m/s. Skýggjað og nakað av regni. Hitin um 9 stig.




**Veðrið leygardagin**
Strúkur í vindi upp í skrið av suðuri, 13-18 m/s. Skýggjað og regn av og á. Hitin um 9 stig. Seinni dagin vestan og andøvsgul upp í strúk, 8-13 m/s. Betri sýni men ælaveður. Hitin um náttina niður í 5 stig.




**Veðrið sunnudagin og mánadagin**
Gul til stívt andøvsgul av vesturi og útsynningi, 5-10 m/s. Skiftandi skýrák og nakað av sól, men í løtum samdrigið og regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Vit vilja ganga á odda

**- Fyri framman standa teir árligu ruddingardagarnir, og í tí sambandinum ætla vit at gera nakað við umhvørvið, sum tað eisini stendur í samgonguskjalinum. Vit fara at upplýsa, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu**


UMHVØRVIÐ
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*




*Umhvørvisdagar verða í Tórshavnar kommunu fríggjadagin og leygardagin*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Fríggjadagurin 28. og leygardagurin 29. apríl eru umhvørvisdagar í Tórshavnar kommunu.

- Vit fara at vísa á, hvussu mann skal rudda, og vit fara at royna at fáa allar partar við. Og niðri á Skálatrøð hava vit nakað nýtt, nevniliga kompost. Tað vil siga, at hevur mann greinar har heima, so kann mann fara oman og fáa tær knústar og síðani fáa tær heimaftur við í sekki, sigur Heðin Mortensen.

- Vit meta, at her skal nakað gerast. Vit hyggja eisini frameftir, bæði við heilsuumhvørvispolitikkin um og orkupolitikkinum.

- Hetta hevur mangla undanfarin ár. Í øllum førum hevur mann ikki lagt nóg stóran dent á tað, og tí fara vit komandi tíðina at brúka nógva orku upp á hetta her. Tað er umráðandi, at Tórshavnar kommuna gongur á odda á hesum økinum, soleiðis at borgarar kunnu síggja eitt reint umhvørvi og kunnu ferðast úti í náttúruni og síggja, at vit royna at ganga væl um, sigur Heðin Mortensen.

- Vit ætla eisini at fáa stovnar, barnagarðar, vøggustovur, skúlar og frítíðarfeløg upp í hetta arbeiðið. Tað er eisini ætlanin, at tá mann søkir um stuðul frá kommununi, tá skal mann líkasum arbeiða fyri og gera nakað fyri tann stuðulin, sum mann fær. Tað verið seg at rudda, planta trø, og annað.

- Vit vóna, at landsins mynduleikar fylgja við, tí har meta vit, at vit ganga á odda, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

## Planta eitt træ

Skálatrøð verður miðdepilin í Umhvørvisdøgunum. Leygardagin frá 10.00-15.00 verður umhvørvistiltak á parkeringsplássinum. 500 plantupakkar verða útflýggjaðir á Skálatrøð, inntil kl. 15.00 ella til uppi er. Borgarar í Tórshavnar kommunu undantikið Kollafirði, Nólsoy og Hesti hava møguleikar at fáa pakkarnar. Planturnar eru álíkar teimum seinasta ár. Eingin uppskriving verður frammanundan, og planturnar verða útflýggjaðar á staðnum.
Plantur til bygdirnar Kollafjørð, Nólsoy, Hest, verða útflýggjaðar hjá umsjónarmanninum á staðnum leygardagin frá kl. 10.

**Greinar verða knústar**
Tórshavnar kommuna hevur keypt maskinu til at knúsa greinar. Maskinan verður á Skálatrøð, og borgarar í kommununi fáa høvi at koma við greinum, sum verða knústar. Talan skal verða um einans greinar og ikki mold og gras. Úr maskinuni kemur stroyggj, sum fólk fær við heim aftur at brúka í urtagørðum.

**Sankutøð**
Sankutøð (kompost), sum gerst alt betri umtókt, er ein frálíkur mátið at endurny´ta. Á Skálatrøð verður høvi at síggja íløt til sankutøðan, eisini verður fólk á økinum, sum fer at greiða frá um hetta.

**Lort í býin**
Nýggju hundalortaposarnir verða eisini at fáa á Skálatrøð. Brúktu posarnir kunnu hóskandi koyrast í eitt av teimum 56 nýggju ruskíløtunum, sum kommunan setur upp kring býin í hesum døgum.

**Umhvørvisgongutúrar**
Sunnudagin 1. mei verður triðji umhvørvisdagurin. Hesin dagur verður gongudagur. Í samstarvi við kunningarstovuni verður skipa fyri fýra gongutúrum í kommununi. Til ber hjá øllum sum orka at ganga at luttaka.

*Kelda: Skriv frá Tórshavnar kommunu*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 13 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 23 |
| Róm | -- |
| Malorca | 24 |
| Athen | 21 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 24 |
| New York | 15 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ






Eitt hátrýst hægri enn 1020 hPa liggur at kalla stilt yvir norðurlendsku hálvoynni. Eitt lágtrýst undir 990 hPa í ein útsynning úr Írlandi flytir seg í ein landnyrðing-norðan og nærkast Føroyum. Tilhoyrandi brúgvaløg ferðast um Føroyar og geva nakað av regni og vindi.


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/4 kl. 06[00]– 27/4. 06[00]. Hitin í gjár: 7,0°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,5 mm – mált frá 27/4 kl. 06[00]– 28/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 67,2 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 24. apr. | Fullmáni |
| 29. apr. | Mánin næstur jørðini |
| 1. mai | Seinna kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29.apríl | 11.30 | - | 10.30 | 23.00 | 10.45 | 23.15 | 01.01 | 13.30 | 02.01 | 14.30 | 09.45 | 22.15 | 08.45 | 21.15 | 11.45 | - | 00.16 | 12.45 | 11.15 | 23.45 | 00.01 | 12.30 |
| 30.apríl | 00.00 | 12.30 | 11.30 | - | 11.45 | - | 02.00 | 14.30 | 03.00 | 15.30 | 10.45 | 23.27 | 09.45 | 22.27 | 00.15 | 12.45 | 01.15 | 13.45 | - | 12.15 | 01.00 | 13.30 |
| 1. mai | 01.12 | 13.55 | 00.12 | 12.55 | 00.27 | 13.10 | 03.12 | 15.55 | 04.12 | 16.55 | - | 12.10 | 11.10 | 23.50 | 01.27 | 14.10 | 02.27 | 15.10 | 00.57 | 13.40 | 02.12 | 14.55 |
| 2. mai | 02.35 | 15.15 | 01.35 | 14.15 | 01.50 | 14.30 | 04.35 | 17.15 | 05.35 | 18.15 | 00.50 | 13.30 | - | 12.30 | 02.50 | 15.30 | 03.50 | 16.30 | 02.20 | 15.00 | 03.35 | 16.15 |
| 3. mai | 03.39 | 16.03 | 02.39 | 15.03 | 02.54 | 15.18 | 05.39 | 18.03 | 06.39 | 19.03 | 01.54 | 14.18 | 00.54 | 13.18 | 03.54 | 16.18 | 04.54 | 17.18 | 03.24 | 15.48 | 04.39 | 17.03 |

5 707265 100050 >